LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
Tinganes
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 22. november 2021
J.Nr.: LUM-16- 21/17960-20
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Skriv viðvíkjandi innliti í fundarfrágreiðing**

Tann 10. september 2021 fekk eg klagu frá A, journalisti í Kringvarpi Føroya, um at Fíggjarmálaráðið ikki vildi lata honum alment innlit í eina fundarfrágreiðing frá fundi millum stjóran á Landsverki og landsstýrismannin í fíggjarmálum. Í klaguni vísti klagarin eisini á, at Fíggjarmálaráðið í hesum høpi átti at latið klagaranum meirinnlit í málið, grundað á almenna áhugan.

Tann 9. september 2021 tók Fíggjarmálaráðið soljóðandi avgerð viðvíkjandi umbøn klagarans um alment innlit:

> "...
> Vísandi til umbøn tína um innlit í fundarinnkalling og fundarfrásøgn frá fundi millum landsstýrismannin í fíggjarmálum, aðalstjóran í FMR og stjóran á Landsverki, seinnapart týsdag 17. august 2021.
>
> Innlitsumbønin í innanhýsis fundarupprit verður ikki gingin á møti, sbr. § 7, nr. 1 í løgtingslóg um alment innlit. Talan er um innanhýsis arbeiðsskjal, sum eru gjørd til egna nýtslu hjá Fíggjarmálaráðnum, og sum ikki eru fevnd av rættinum um alment innlit.
> ..."

Ásetingin í § 7 í innlitslógini, sum Fíggjarmálaráðið grundaði avgerð sína á, heimilar myndugleikanum at skerja rættin til skjalainnlit í tey skjøl, sum nevnd eru í ásetingini. Heimildin loyvir, at slík skjøl verða undantikin í síni heild. Tó kunnu í hesum skjølum vera upplýsingar um veruligar umstøður, ið ikki eiga at vera fevndar av skerda skjalainnlitinum í § 7, men latnar sambært § 11, stk. 1.

§ 7, nr. 1 í innlitslógini er soljóðandi:

> "§7. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru 1) skjøl sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu ..."

Ásetingin er ætlað at verja innanhýsis avgerðargongdina hjá myndugleikanum.

Á síðu 40 í “Betænkning om Offentlighedsloven, betænkning nr. 1510” stendur m.a. soleiðis um innlit í fundarfrágreiðingar, ið samsvarar við tað, ið er galdandi í § 7, nr. 1 í innlitslógini:

> ”…
> De dokumenttyper, der for det første kan undtages fra retten til aktindsigt, er interne arbejdsdokumenter (§ 7). Som eksempel på dokumenter, der er omfattet af denne undtagelsesbestemmelse, kan nævnes interne referater af møder i en myndighed…”

Eftir at hava hugt eftir fundarfrágreiðingini eri eg av tí fatan, at talan er um eitt innanhýsis skjal, ið er gjørt til egna nýtslu hjá ráðnum, og tískil er at meta sum eitt innanhýsis arbeiðsskjal í Fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarmálaráðið hevur upplýst fyri mær, at fundarfrágreiðingin ikki er send nøkrum øðrum uttanfyri ráðið.

Eg eri tí samd við Fíggjarmálaráðið í, at fundarfrágreiðingin er undantikin almennum innliti sambært § 7, nr. 1 í innlitslógini.

Tá ið skjøl eru fevnd av undantakinum til skjalainnlit sambært § 7, skal myndugleikin meta um, um tað eru ítøkiligar upplýsingar í skjølunum, ið skulu latast sambært § 11, stk. 1 í innlitslógini, ið er soljóðandi:

> “§ 11. Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar.”

Eftir at hava hugt eftir fundarfrágreiðingini kann eg staðfesta, at skjalið ikki inniheldur upplýsingar um veruligar umstøður, sum innlit sambært § 11 stk. 1 eigur at verða latið í.

Sambært § 4, stk. 1, 2. pkt í innlitslógini kann ein myndugleiki loyva skjalainnliti í størri mun, enn lógin ásetir, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m. Hetta merkir, at hóast eitt mál, skjøl ella upplýsingar sambært innlitslógini eru undantikin frá rættinum til innlit, so kann myndugleikin eftir umstøðunum gera av at veita innlit í hesi. Hetta kallast eisini meginreglan um meirinnlit.

Á síðu 64 í “Betænkning om Offentlighedsloven, betænkning nr. 1510” stendur m.a. soleiðis um meirinnlit, ið samsvarar við tað, ið er galdandi í § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini:

> “...
> • Det følger i øvrigt af meroffentlighedsprincippet, at en myndighed af egen drift – dvs. også i tilfælde, hvor et ønske om meroffentlighed ikke specifikt er fremsat i en begæring om aktindsigt – bør overveje, om der bør gives meroffentlighed.
> • Meroffentlighedsprincippet indebærer, at en forvaltningsmyndighed kan vælge at give aktindsigt, selvom der ikke er ret til aktindsigt i vedkommende sag, dokumenter eller oplysninger. Ved vurderingen af, om der i sådanne tilfælde bør gives meroffentlighed, foretages der en afvejning af på den ene side hensynet til navnlig de beskyttelsesinteresser, der ligger bag relevante undtagelsesbestemmelser, og på den anden side hensynet til de interesser, der ligger bag begæringen om aktindsigt.
> • Forvaltningsmyndighederne kan dog alene meddele meroffentlighed under iagttagelse af reglerne om tavshedspligt mv. Dette indebærer, at myndighederne i forbindelse med anvendelsen af meroffentlighedsprincippet skal respektere de almindelige regler om tavshedspligt i straffeloven og forvaltningsloven samt særlige regler om tavhedspligt.
> …”

Sum umboðsmaður kann eg kanna, um ein myndugleiki hevur umhugsað at veita meirinnlit, og um myndugleikin í hesum sambandi hevur tikið viðkomandi og saklig atlit.

Í teimum skjølum, ið eg havi fingið í sambandi við viðgerðina av hesum máli, er onki, ið vísur, at Fíggjarmálaráðið hevur umhugsað og tikið støðu til spurningin um meirinnlit. Undir øllum umstøðum, átti slík umhugsan og støðutakan at verið fráboðað tí, ið setti fram umbønina um innlit, tá avgerð varð tikin um innlitsumbønina.

Av tí at tað ikki sæst í skjølunum í málinum um Fíggjarmálaráðið hevur tikið støðu til spurningin um meirinnlit, fái eg heldur ikki mett um, hvørt Fíggjarmálaráðið hevur tikið viðkomandi og saklig atlit í hesum høpi.

Vísandi til omanfyristandandi fari eg tískil at heita á Fíggjarmálaráðið um at viðgera spurningin um meirinnlit í fundarfrágreiðingina og geva klagaranum eitt grundað svar um hetta.

Eg fari at biðja Fíggjarmálaráðið um at lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Í sambandi við viðgerðina av hesum máli var ógreitt á hvønn hátt fundarfrágreiðingin er skjalførd í Fíggjarmálaráðnum. Tískil fari eg biðja Fíggjarmálaráðið at greiða mær frá, hvussu Fíggjarmálaráðið hevur skjalført fundarfrágreiðingina, og samstundis lata mær mannagongdina, ið Fíggjarmálaráðið hevur um skjalføring av slíkum skjølum.

Omanfyristandandi var sent Fíggjarmálaráðnum og klagaranum, í skrivi tann 30. september 2021.

Tann 22. oktober 2021 gav Fíggjarmálaráðið mær skjøl og soljóðandi frágreiðing um á hvønn hátt umrødda fundarfrágreiðingin var skjalførd í ráðnum:

> "Fíggjarmálaráðið hevur skrásett innanhýsis frásøgnina í mál nr. 21/17842. Yvirlit yvir málið er hjálagt. Vegna innanhýsis misskiljingar vórðu skeiv boð givin, um at onki mál var stovnað, tí mál var stovnað tann 9. september 2021.
>
> Spurningurin um, hvat skal journaliserast er sum kunnugt ikki serliga væl reguleraður í lóggávuni, tó so, at nakrar meginreglur kunnu útleiðast av innlitslógini og siðvenju hjá umboðsmanninum.
>
> Til kunnleika verður okkara innanhýsis skjalamannagongd umframt eitt innanhýsis upplegg, sum ... helt fyri stjórnaráðnum um sama evni. Nýggj tøkni og nýggj journalskipan gera møguliga, at mannagongdin viðvíkjandi skráseting av innanhýsis tilfari eigur at verða eftirmett. Fíggjarmálaráðið fer at viðgera henda spurning í næstum."

Tann 28. oktober 2021 gav Fíggjarmálaráðið mær avrit av soljóðandi telduposti um meirinnlit, ið ráðið hevði sent klagaranum:

> "...
> Tú sendi 9. september 2021 Fíggjarmálaráðnum eina umbøn um innlit í fundarinnkalling og fundarfrágreiðing frá fundi millum landsstýrismannin í fíggjarmálum, aðalstjóran í Fíggjarmálaráðnum og stjóran á Landsverki, sum var tann 17. august 2021. Fíggjarmálaráðið noktaði sama dag at lata innlit í tilfarið vísandi til § 7, nr. 1 í innlitslógini.
>
> Tú klagaði síðani til Løgtingsins Umboðsmann um, at innlitsumbønin varð havnað.
>
> Løgtingsins Umboðsmaður hevur í skrivi dagfest 30. september 2021 heitt á Fíggjarmálaráðið um at umhugsa at lata meirinnlit í tilfarið lutvíst grundað á, at Løgtingsins Umboðsmaður er samdur við Fíggjarmálaráðnum í, at talan er um innanhýsis tilfar, sbr. § 7, nr. 1 í innlitslógini og lutvíst grundað á, at tað ikki skilliga gongur fram av avgerðini, at Fíggjarmálaráðið hevur umhugsað, hvørt stjórnarráðið kundi latið meirinnlit í tilfarið, sbrt. § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini.
>
> Eftir at hava umhugsað málið av nýggjum hevur Fíggjarmálaráðið avgjørt at halda fast við uppruna avgerðina um ikki at veita meirinnlit í málið.
>
> Avgerðin er grundað á atlit, ið skulu at tryggja eitt frítt samskifti millum landsstýrismannin og fyrisitingina, har ikki alt kemur út til almenningin. Verður tilfar, sum kemur fram í hesum sambandi ikki hildið innanhýsis, kann hetta tyngja fyrisitingina og viðføra, at frásagnir ikki verða skrivaðar í sambandi við óformellar fundir.
>
> Tá ásetingin um meirinnlit verður vigað upp ímóti atlitinum um eitt frítt samskifti millum landsstýrismann og fyrisiting, metir Fíggjarmálaráðið ikki, at tað hevði verið skynsamt at latið meirinnlit í tilfarið í hesum máli. Hugsað verður serliga um, at eftirlitsmyndugleikar, so sum Landsstýrismálanevndin í Løginginum og Løgtingsins Umboðboðsmaður, hava rætt til at fáa innlit í øll skjøl, soleiðis at teir kunnu hava eftirlit við fyrisitingini.

> Tað er tí ongantíð soleiðis, at fyrisitingin kann virka ótarnað, uttan at nakað eftirlit er við henni.
> ...”

Eg taki omanfyristandandi frágreiðing, dagfest 22. oktober 2021, og teldupostin, dagfestur 28. oktober 2021, frá Fíggjarmálaráðnum til eftirtektar.

Burtursæð frá omanfyristandandi viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum til kunningar og verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara - www.lum.fo - í navnleysum líki.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður